## Einki nýtt

Á kriminaldeildini á politistøðini, sum nú hevur málið um hendi, verður sagt, at einki nýtt er at frætta.

Avhoyringar vórðu framdar mikudagin seinnapart, og tær kanningar, sum skulu gerast í einum slíkum máli, verða gjørdar í løtuni.

Eingin er enn handtikin, men støðleiðarin hevur úttalað seg til fjølmiðlar og sagt, at hann er sannførdur um, at løgreglan fer at finna fram til onkran, sum stendur aftanfyri hesa skemdargerð.

Ferðslulógin ikki vird:

# Bilførarar nokta at sleppa fartelefonini

**Í sindur meira enn eitt ár hevur forboð verið at nýta fartelefon meðan mann koyrir, men henda lógin verður ikki vird, sigur løgreglan**

FARTELEFON
*Jón Festirstein Andreasen*



Nýggja ferðslulógin sigur, at »førari av akfari má ikki, meðan koyrt verður, brúka handhildna fartelefon.« Soleiðis ljóðar lógin, ið bleiv samtykt 10. mai 2000 og kom í gildi 1. juli 2000, ið forbjóðar nýstlu av handhildnum fartelefonum, meðan koyrt verður.

Henrik Rubeksen frá politinum metir, at tað eru ov nógv, ið ikki virða hetta forboðið. Hann sigur, at nærum øll tosa í fartelefon, samstundis við at tey koyra. Sostatt kann mann siga, at forboðið ongan ávirkan hevur havt á fartelefonnýtsluna hjá fólki.

– Tað er óansvarligt at koyra soleiðis. Mann setir bæði seg sjálvan og onnur í vanda, sigur Henrik Rubeksen og mælir sostatt til, at fólk fáa sær tær sonevndu »headset« til fartelefonir, ið ger handaleysa fartelefonnýtslu møguliga. Tað er samstundis ein av orsøkunum til, at fólk ikki virða forboðið, tí tey tíma ikki at gera sær tann ómak at keypa headset til fartelefonir.

Politiið handhevur hetta sum onnur mál. Verður ein tikin í at tosa í fartelefon, meðan hann koyrir, fær hann eina bót. Í serligum førum, sum t.d persónskaði og skaði á øðrum lutum, kann ein missa koyrikortið.

### Minkar um konsentratiónina

Í 1996 gav Rådet for Trafiksikkerhedsforskning eitt álit út, har teir komu til til tí niðurstøðu, at nýstla av fartelefon, meðan koyrt verður, minkar um konsentratiónsevni hjá føraranum og økir um reaktiónstíðina.

Tó eru eingi ítøkilig dømi um ferðsluóhapp, har í fartelefonir hava elvt til óhappið. Álitið mælir til, at førarar ístaðin fáa sær tær fyrrnevndu headset til telefonirnar. Eisini leggur hon upp til, at mann eigur at umhugsa, og møguliga forbjóða, onnur ting í møguliga kunnu minka um konsentratiónina, sum t.d royking og at tendra radio.

### Ikki bert til ampa

Tað kann vera hent at hava eina fartelefon við úti í ferðsluni. Um t.d eitt bilóhapp skuldi komi fyri, so er fartelefonin eitt hent amboð at hava við sær.

Tað eru dømi um, at fólk við fartelefon, hava boða løgregluna frá um rúsdrekkakoyring. Tó skal mann eisini leggja sær í geyma, ikki at brúka fartelefonina óansvarliga, so at hon elvir til óhapp.


SPENNANDI STØRV
*Á RESTAURANT HAFNIA*

Vit sóknast eftir:
· tænaranæmingi
· tænara til morgunvaktir og kvøldvaktir
- fast annaðhvørt vikuskifti

at byrja í oktober!

*Tað krevst, at umsøkjarar:*
- eru fyrikomandi
- eru álítandi
- hava góð samstarvsevni
- eru áhugaðir at læra nýtt
- eru 18 ár ella eldri
- eru tænastuhugaðir

Útbúgvingin sum tænari gevur stórar framtíðarmøguleikar, bæði her heima og í útlondum. Útbúgvingin gevur næmingum hollan kunnleika innan nógv ymisk øki. T.d. læruna um vín, øl, spiritus, kaffi, matgerð og útskering av kríatúrum, fugli og fiski o.s.fr.

Harafturat lærir tú fakorð á fleiri málum innan sølu, tænastu, roknskap og teldufrøði.

*Nærri upplýsingar kunnu fáast við, at venda sær til:*
Rósu Mariu R. Brodersen
ella
Michael Jensen



team85

P/F Hotel Hafnia
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50

HOTEL HAFNIA


# James Olsen Returns

**Leygarkvøldið fer popparin James Olsen at hava konsert við einum bólki av garvaðum tónleikarum. Arbeiðið saman við Erann DD er liðugt á hesum sinni**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*



*James Olsen hevur savnað eitt gott lið av tónleikarum, sum fer at undirhalda í badmintonhøllini leygarkvøldið*

James hevur ferðast við Erann DD runt um í Norðurevropa, har sangarin veruliga hevur fingið vind í seglini. Við í bólkinum hjá Erann var føroyski James Olsen, sum slær á trummur í tónleikabólkinum.

– Erann er við at gerast eitt stórt navn í norðurlondum, og tað hevur verið fantastiskt at royna lívið sum yrkistónleikari, sigur James Olsen.

James sigur, at øll tiltøkini vóru ógvuliga væl fyriskipað, og sum tónleikari skuldi tú bara hugsa um tónleikin.

Konsertferðin er nú at enda komin, og James heldur fram í øðrum tónleikabólkum, sum hann er við í, og tað dámar honum væl.

### Konsert í Føroyum

Nú er eyðkendi James Olsen aftur í Føroyum. Her fer hann at hava eina konsert, sum verður í badmintonhøllini leygarkvøldið.

Hann hevur savnað nakrar garvaðar føroyskar tónleikarar. Pauli Magnussen spælir bass, Ólavur Øster spælir guitar, Rógvi á Rógvu spælir ljómborð og James Olsen slær á trummur og fer væl at syngja eisini.

James sigur, at bólkurin fer at spæla nýggjari britpop løg og eldri løg í nýggjum hami. Løgini eru øll sonevnd cover-løg hjá øðrum bólkum.

Hann slær í øllum førum fast, at áhoyrarin kann vænta sær eina megnar framførslu í høllini.



# Valdið er framvegis í Føroyum

**Hóast Danmark tekur undir við at seta grein 5 í NATO-sáttmálanum í gildi, broytir tað einki í ríkisrættarligu støðuni hjá Føroyum. Heimastýrislógin og stýrisskipanin eru framvegis í gildi, sigur løgrfrøðingur**

NATO-SÁTTMÁLIN
*Eyðun Klakstein*



*Hóast NATO-londini - og harvið eisini Danmark - hava sett tann sonevnda musketereiðin í gildi, so broytir tað einki í ríkisrættarligu støðuni hjá Føroyum, sigur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur*

NATO-londini gjørdu mikudagin av, at tey skulu seta sonevnda musketereiðin í gildi.

Hetta er grein 5 í NATO-sáttmálanum sum staðfestir, at álop á eitt av NATO-londunum skal roknast sum álop á øll NATO-londini, og at limalondini í NATO vilja stríðast sum ein maður móti yvirgangsmonnum.

Danska stjórnin tekur undir við hesi avgerð, og tað merkir, at Føroyar eru eisini umfataðar av avgerðini.

- Tá tað snýr seg um verjupolitikk og uttanríkispolitikk, so umfata avgerðir hjá Danmark eisini Føroyar. Danska stjórnin umsitir verjumál og uttanríkismál fyri alt ríkið, og tí hava Føroyar eisini tikið undir avgerðini hjá NATO, sigur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur.

- Hetta hevur tó einki at siga fyri ríkisrættarligu støðuna hjá Føroyum. Alt er sum vanligt, føroyingar hava framvegis heimastýrið, og okkara stýrisskipan er framvegis í gildi.

### Danir avgjørdir

Uttanríkispolitiska nevndin hjá Fólkatinginum var so gott sum samd um at stuðla avgerðini um at seta grein 5 í NATO-sáttmálanum í gildi.

- Vit siga við hesum við USA, at vit standa saman við tykkum. Hevur USA brúk fyri hjálp, so eru vit til reiðar at hjálpa, segði danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, mikudagin.

Eisini partamaður hansara, uttanríkiráðharrin Mogens Lykketoft, var avgjørdur í, at hetta var rætta avgerðin at taka.

- Tað eru allar sivilisatiónir, sum eru hóttar av hesum álopi, og tí skulu vit ikki bert standa saman í ES og NATO, men vit skulu eisini fáa onnur lond við í eitt felags stríð móti yvirgangi, segði hann.

### Lógir kunnu setast úr gildi

Avgerðin hjá NATO-londunum merkir ikki, at londini eru sett í krígsstøðu. Tí hevur avgerðin um at seta grein 5 í verk í fyrstu syftu ikki tað stóra, men hon kann fara at føra til meira seinni.

- Enn eru Føroyar ikki ávirkaðar av hesum stríði, men tað verðurr øðrvísi, um veruligt kríggj brestur á. Tað finst eingin lóg um, hvussu farast skal fram í krígsstøðu, men í ekstremum støðum kann neyðrætturin hava við sær, at allar galdandi lógir og skipanir kunnu verða settar úr gildi, sigur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur.

- Ofta samtykkja parlamentini serligar lógir, tá kríggj er. Tey kunnu til dømis seta skamtan í verk, og verður talan um kríggj, so er støðan ein heilt onnur. Men í fyrstu syftu er alt sum vanligt í føroyska samfelagnum, hóast Danmark tekur undir við at seta grein 5 í NATO-sáttmálanum í gildi, sigur hann.

# Føroyar skulu verða við



*- Er tað á nakran hátt gjørligt at beina fyri hesum ræðuliga yvirgangsvirksemi, so skal tað gerast. Og kann føroyska samfelagið á onkursvegna hjálpa til við hesum, so skulu vit eisini gera tað, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður*

**Yvirgangsálopini í USA eru eitt álop á allan tann fría heimin, og tí skulu Føroyar stuðla atgerðum, sum kunnu beina fyri ræðuliga yvirgangsvirkseminum, sigur løgmaður**

YVIRGANGUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyar skulu stuðla atgerðum, sum hava til endamáls at steðga yvirgangsvirksemi, og kunnu Føroyar onkurvegna hjálpa til, so skulu vit eisini gera tað.

Tað heldur ein avgjørdur løgmaður, nú NATO hevur sett grein 5 í sínum sáttmála í gildi.

- Danmark er limur í NATO, og Danmark hevur sett NATO-sáttmálan í gildi fyri Føroyar eisini, men fyri føroyskar myndugleikar merkir hetta stigið einki í sær sjálvum. Tó eiga vit at taka undir við tí, sigur Anfinn Kallsberg.

### Undirgraving

- Álopini á New York og Washington vóru ikki bara álop á USA, man á allan tann fría heimin, og tey, sum standa aftan fyri álopini, vilja undirgrava fólkaræði. Tí eiga vit, sum ein partur av vesturheiminum, at verða við til beina fyri hesum yvirgangsvirksemi í tann mun, vit eru før fyri at verða við.

Nú verður sagt, at tey seku skulu finnast, og so skal beinast fyri hesi hóttan framyvir. Tekur tú undir við tí?

- Er tað á nakran hátt gjørligt at beina fyri hesum ræðuliga yvirgangsvirksemi, so skal tað gerast. Og kann føroyska samfelagið á onkursvegna hjálpa til við hesum, so skulu vit eisini gera tað, sigur Anfinn Kallsberg.


